# Lasse Klein aftur í Sjálvstýrisflokkinum

**Fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum – og seinni løgtingsmaðurin hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, Lasse Klein, býður seg nú fram sum valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy**



*Hann hevur sitið sum landsstýrismaður í eitt valskeið fyri Sjálvstýrisflokkin, og tvær ferðir varð hann valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin, áðrenn hann fór úr flokkinum og varð valdur á ting fyri Kristiliga Fólkaflokkin í 1994. Í 1998 varð hann ikki afturvaldur. Nú bjóðar Lasse Klein Sámal Peturi í Grund av*

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Eg vil fegin verða við til at lyfta Sjálvstýrisflokkin upp úr trupulleikunum, segði Lasse Klein, fyrrverandi landsstýris- og løgtingsmaður við Deg og Viku í týskvøldið, samstundis sum boðað varð frá, at hann hevur játtað at stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy til næsta løgtingsval.

Mikið rok hevur verið um Sjálvstýrisflokkin, síðani Sámal Petur í Grund bjóðaði Helenu Dam á Neystabø av til formansvalið. Úrslitið av hesum stríði gjørdist, at Helena Dam á Neystabø meldaði seg úr Sjálvstýrisflokkinum.

Eftir lemjandi ósigurin hjá flokkinum til fólkatingsvalið – og serliga hjá floksformanninum, Sámal Peturi í Grund, valdi hann at leggja frá sær, og Eyðun Elttør, landsstýrismaður, er nú formaður Sjálvstýrisfloksins.

Persónliga valið hjá Sámali Petur í Grund var sera vánaligt. Hann misti 1.045 atkvøður í mun til seinasta fólkatingsval og fekk einans 73 atkvøður kring alt landið. Í hansara egna valdømi, Eysturoy, fekk hann einans 21 atkvøður í móti 365 til seinasta fólkatingsval og 533 til seinasta løgtingsval.

Í Degi og Viku varð eisini sagt, at Lasse Klein stillar upp, líka mikið um Sámal Petur í Grund verður á sama lista ella ikki.

Tí er tað ymiskt sum bendir á, at tað verður kapping millum Sámal Petur í Grund og Lassa Klein um at vinna løgtingssessin hjá Sjálvstýrisflokkinum aftur í Eysturoynni. Talan er um eitt eykamandat, so tað kann eisini fella aðra staðni í landinum.

Lasse Klein varð valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy í 1988 og í 1990. Í 1994 varð hann valdur fyri Kristiliga Fólkaflokkin í Eysturoy, men hann varð ikki afturvaldur til valið í 1998. Hann fekk tá 147 atkvøður í Eysturoy.

# Lasse og Sámal Petur stríðast um løgtingsess

*Sámal Petur í Grund var toppskorari í Eysturoyar valdømi til løgtingsvalið í 1998. Hann fekk 533 persónligar atkvøður. Til fólkatingsvalið 20. november í ár fekk hann bara 21 atkvøður í Eysturoy*



**Sámal Petur í Grund var toppskorari í Eysturoynni við 533 persónligum atkvøðum til seinasta løgtingsval. Til fólkatingsvalið 20. november í ár fekk hann bert 21 atkvøður í Eysturoynni. Nú hevur Lasse Klein bjóðað hon av**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Lasse Klein trein inn á politiska pallin í januar 1985, tá hann gjørdist landsstýrismaður fyri Sjálvstýrisflokkin í samgonguni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin Føroya Framburðs og Fiskivinnuflokk.

Lasse Klein varð valdur á ting í 1988, og hann varð afturvaldur til løgtingsvalið í 1990. Tá umboðaði hann Sjálvstýrisflokkin saman við Helenu Dam á Neystabø og Asbjørn Jonesen. Men ósemja tók seg upp í flokkinum, og á vári í 1994 fór Lasse Klein úr Sjálvstýrisflokkinum.

Til valið í 1994 stillaði Lasse Klein upp fyri Kristiliga Fólkaflokkin, sum tá varð farin í tvíningar, hin parturin gjørdist Miðflokkurin. Lasse Klein varð valdur, og Sjálvstýrisflokkurin misti mannin í Eysturoynni. Sjálvstýrisflokkurin fekk tvey fólk á ting, Helenu Dam á Neystabø í Havn og Álv Zachariassen í Klaksvík.

Eftir at Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Verkamannafylkingin skipaðu samgongu eftir valið í 1994, gjørdist Sámal Petur í Grund landsstýrismaður – og varð tað fyrstu ferð, hann trein fram á politiska pallin.

Í desember 1997 nýtti Edmund Joensen, løgmaður, á fyrsta sinni rættin, løgmaður fekk við nýggju stýrisskipanarlógini, at siga landsstýrismann úr starvi. Tað varð Sámal Petur í Grund, sum var tann fyrsti at fáa henda ivasama heiður: at verða koyrdur frá sum landsstýrismaður.

Men hann var væl umtóktur politikari tá, og varð hann valdur á ting fyrstu ferð í 1998 við ikki færri 533 persónligum atkvøðum í Eysturoyar valdømi – hann fekk nógv flestar persónliga atkvøður í valdøminum. Næstur honum var Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum við 388 atkvøðum.

## Nøkur fakta um Sjálvstýrisflokkin:

**1985:** Lasse Klein verður landsstýrismaður fyri Sjálvstýrisflokkin
**1988:** Lasse Klein valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy
**1990:** Lasse Klein valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy
**1994:** Lasse Klein meldar seg úr Sjálvstýrisflokkinum
**1994:** Lasse Klein verður valdur á ting fyri Kristiliga Fólkaflokkin
**1994:** Sámal Petur í Grund verður landsstýrismaður fyri Sjálvstýrisflokkin
**1997:** Sámal Petur í Grund verður koyrdur frá sum landsstýrismaður
**1998:** Sámal Petur í Grund fær 1.118 atkvøður til fólkatingsvalið – sera gott úrslit fyri Sjálvstýrisflokkin
**1998:** Sámal Petur í Grund verður valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy
**2001:** Sámal Petur í Grund verður landsstýrismaður
**2001:** Sámal Petur í Grund verður formaður í Sjálvstýrisflokkinum
**2001:** Helena Dam á Neystabø fer úr Sjálvstýrisflokkinum
**2001:** Sámal Petur í Grund fær 73 atkvøður til fólkatingsvalið – eitt sera vánaligt val fyri Sjálvstýrisflokkin
**2001:** Sámal Petur í Grund fer frá sum formaður í Sjálvstýrisflokkinum
**2001:** Eyðun Elttør verður formaður í Sjálvstýrisflokkinum



# Føroyingar uttanlands búgva seg til løgtingsval

**Hóast tað enn eru nakrir mánaðir til núverandi løgting hevur sitið skeiðið út, og politiska støðan hjá samgonguflokkunum í løtuni ikki beinleiðis talar fyri einum vali í úrtíð, so er tíðin nú komin hjá føroyskum lesandi uttanlands at tryggja sær valrætt til komandi løgtingsval**

*Føroyingar í útbúgving uttanlands hava síðani løgtingsvalið 1994 havt valrætt til løgtingsvalið, men teir kunnu ikki veljast á ting*



VALRÆTTUR
*Rúnar Reistrup*

Við einari broyting í løgtingsvallógini í 1992 fingu føroyingar, ið eru búsitandi uttanlands í lestrarørindum, valrætt til løgtingið. Broytingin varð framd, eftir at lesandi útisetaføroyingar í fleiri ár høvdu stríðst fyri at varðveita føroyska valrættin í tíðini har teir fóru av landinum í útbúgvingarørindum.

Men føroysikir útisetar skulu vera úti um seg í góðari tíð, um teir vilja brúka sín varðveitta valrætt til løgtingið. Og hóast lítið talar fyri einum løgtingsvali fyrr enn einaferð komandi vár, so heitir Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) longu nú í limablaðaðnum Fjølnir á limir sínar um at søkja um upptøku á vallista í Føroyum.

### Knøpp tíð

Orsøkin til at MFS soleiðis tekur forskot uppá føroyska løgtingsvalið er, at tíðin kann gerast rættiliga knøpp hjá uttanlandsføroyingunum, um teir bíða við at søkja um upptøku á vallista, til eftir at løgtingsvalið er útskrivað. Fyri at fáa valrætt skal umsóknin nevniliga verða liðugt viðgjørd í fyrrveradi bústaðarkommununi hjá umsøkjaranum í seinasta lagi fimm vikur undan valdegnum.

Sambært løgtingsvallógini skal løgmaður áseta valdagin við í minsta lagi 6 viku og í mesta lagi 8 viku freist. Velur løgmaður stytstu møguligu freistina, hava føroysku útisetarnir sostatt bert eina viku til at fáa hendur á umsóknarblaði, útfylla hetta við persónligum upplýsingum umframt eini váttan frá útbúgvingarstaðnum, senda umsóknina til fyrrverandi bústaðarkommununa, og fáa hana bæði viðgjørda og góðkenda. Hetta kann lætt gerast ógjørligt, og tí er umráðandi hjá lesandi útisetum, ið ætla sær at greiða atkvøðu, at søkja nú, áðrenn løgtingsval verður útskrivað.

### Skulu søkja umaftur

Treytirnar fyri at ein føroyingur búsitandi í øðrum landi hevur valrætt til løgtingið, eru, umframt at viðkomandi er undir útbúgving, at umsøkjarin hevur verið skrásetttur í føroyska fólkayvirlitinum í minsta lagi 5 ár samanlagt, og annars lýkur treytirnar, í løgtingsvallógini. Haraftur-at skal umsøkjarin ikki hava havt tilhald uttan fyri Føroyar í meira enn 8 ár.

Tað er í hvørjum føri fólkayvirlitið í seinastu bústaðarkommununi, sum tekur avgerð um at seta umsøkjara á vallistan. Avgerðin er galdandi í tvey ár, og tí skulu tey, ið søktu um upptøku á vallistan til seinasta løgtingsval 30. apríl 1998, søkja umaftur, skulu tey hava valrætt til komandi løgtingsval.

### Au-pair gentur eisini valrætt

Reglurnar fyri hvør kann sigast at vera undir útbúgving eru rættiliga leyst orðaðar. Tað eru eingi krøv um hvørki útbúgvingarstøði, útbúgvingarskeið ella um at talan skal vera um fulltíðarútbúgving. Í viðmerkingunum til løgtingsvallógina stendur, at eisini uppihald uttanlands við tí fyri eyga at læra mál er at meta sum útbúgving í hesum føri. Í viðmerkingum verður hugtakið "au-pair genta" nevnt sum dømi um, hvør er at meta sum "føroyingur í lestararørindum uttanlands".

### Fá nýta valrættin

Talið á føroyskum útisetum, ið lúka treytirnar fyri valrætti til løgtingsvalið, liggur helst tætt at teimum tveytúsund og hesir eru soleiðis ein lutfalsliga stórur partur av føroyska veljaraskaranum. Men talið á umsóknum um upptøku á vallista í Føroyum hevur verið lutfalsliga lágt síðan lógarbroytingin, ið gjørdi vallutøkuna hjá útisetunum møguliga, varð samtykt í 1992.

Umsókn um upptøku á vallista til løgtingsval skal skrivast á eitt serligt umsóknarblað. MFS hevur sent øllum limum sínum hetta umsóknarblað saman við áheitanini um at søkja longu nú. Føroysk lesandi uttanlands, sum ikki eru limir í MFS, kunnu fáa umsóknarblaðið útflýggjað frá føroysku kommununum og á føroyskum viðskiftastovum.

Løgtingsvallógin gevur ikki føroyingum í útbúgving uttan fyri Føroyar valbæri, men einans valrætt, til løgtingsval.


